# Listaleypurin

Listaleypurin er føroyska útgávan av tí, tey í Noregi kalla “Den kulturelle Skolesekk”. Listaleypurin snýr seg um at fáa tíggju sýningar (framførslur ella framsýningar) um árið, sum kunnu ferðast runt millum skúlar. Hvør sýning vitjar 5 skúlar. Hetta snýr seg um sýningar á høgum listarligum støði.

Listafólk søkja sjálvi um at vera við. Ein nevnd, sum umboðar allar listagreinir, og ein limur fyri skúlaverki velja millum innkomnu umsóknirnar og játta úr 10.000 kr upp í 40.000 kr til hvørja av teimum 10 árligu verkætlanunum.

Skúlarnir fáa sendandi og kunnu tekna seg til at fáa vitjan. Skúlarnir gjalda ikki fyri hesar vitjanir.

Játtaðar eru 450.000 kr um árið í 3 ár til Listaleypin, hetta verður goldið av Mentamálaráðnum, kommununum og Norðurlandahúsinum í felag.

Millum 1500 og 2000 næmingar fáa hvørt skúlaár gleði av hesi verkætlan.

Í fjør komu uml. 20 umsóknir inn. Peningur varð játtaður til 10 av hesum. Tónleikur fylti heilt nógv í umsóknunum, og bert 1 umsókn var frá okkara øki, altso innan bókmentir.
Tað er av alstórum týdningi, at høvundar nýta hendan møguleika. Hetta er peningur, sum verður játtaður til mentan, og bókmentir eiga sín part av køkuni. Tað er upp til limir okkara at finna áhugaverdar verkætlanir og søkja Listaleypin.
Hetta kann t.d. nýtast til at gera áhugaverda høvundavitjan, og møguleiki er eisini at sláa seg saman við aðrari listagrein og soleiðis gera okkurt størri burturúr.

Komandi umsóknarfreist er 30. apríl.

Rakel Helmsdal, limur Rithøvundafelagsins í nevndini fyri Listaleypin